## HEILSANIR



**Góði Samson**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum.
**Heilsan vit í Gøtu**



Hesin sjeikurin gjørdist PIPARSVEINUR í dag. Tillukku stóribeiggi.
**Systkini**





**Góði Páll**
Tillukku við 19 ára føðingardegnum.
**Bestu heilsanir, Hildur**



Til tykkum, sum hava fylt 70 ár, Jákup Eli, Jógvan, Nicolina og Torleif, hjartaliga tillukku og alt tað besta.
**Heilsan, Fanny**








# Sosialurin & Internet Sosialurin

# ÓKEYPIS

Nú Sosialurin fyllir 75 ár í ár, so ber tað til at gerast haldari av Sosialinum ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum. Samstundis loyva vit okkum at senda tykkum eitt uppkrav fyri aprílársfjórðing.

Tíðindablaðið
Sosialurin
BOX 76
110 Tórshavn

Undirritaði ynskir at fáa Sosialin sendandi ókeypis í mars mánað og fær uppkrav fyri aprílársfjórðing sendandi

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Navn:
Bústaður:
Post nr., bygd, býur:
Telefon
e-mail:
Undirskrift:




## FØÐINGAR

30. januar fingu Claudia Bjarnastein og Søren Antoft, Kalundborg, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3800 gr.

19. februar fingu Jannie Vestergaard og Rógvi Petersen, Vágur, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3450 gr.

21. februar fingu Heine, Filip og Laila eina lítla systur, hon var 53 cm. long og vigaði 3720 gr. Foreldur teirra eru Marian og Niels Pauli Winthereig, ið eru búsitandi í Møldrup í Danmark.

21. februar fingu Marjun Leivsdóttir og Pero Sore, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3700 gr.

22. februar fingu Britt Kirke Petersen, Vágur og Andrass Djurhuus, Porkeri, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4500 gr.

22. februar fingu Irena og André Matras, Norðoyri, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3700 gr.

23. februar fingu Jónvá og Dánjal Danielsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3900 gr.

23. februar fingu Malan og Øssur Steinhólm, Leirvík, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3950 gr.

24. februar fingu Lillian Djurhuus og Bjørn Thorsteinsson, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4800 gr.

25. februar fingu Esmar og Gunnvá Müller, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4200 gr.

25. februar fingu Maibritt Trondesen og Hjalmar Ingebrigtsen, Válur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4070 gr.

25. februar fingu Ena og Magnus Pauli Dahl-Olsen, Saksun, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3050 gr.

26. februar fingu Hildigunn Láberg og Hans Vilhelm Lützen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3950 gr.

26. februar fingu Randi Dam Joensen og Karsten Jensen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3450 gr.

28. februar fingu Beinta Lisberg og Símun Jensen, Sandur, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3270 gr.

28. februar fingu Borghild Hansen og Martin Knudsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 3800 gr.

28. februar fingu Paula og Høgni Høgnesen, Strendur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3500 gr.

## ANDLÁT

**19. februar**
Dorthea Simonsen, Tórshavn, 87 ár.

**20. februar**
Dorthea Dam, ættað úr Sandavági, búsitandi í Havn, 79 ár.

**21. februar**
Dánjal Magnussen, Kvívík, 78 ár.
Guðrun Pálsdóttir Danielsen, Velbastað, 73 ár.

**23. februar**
Hans Mikkelsen, Toftir, 78 ár.
Ása Vágsheyg, fødd Mortensen, Tórshavn, 86 ár.

**24. februar**
Herman Jensen, búsitandi í Hvidovre, ættaður úr Vági, 56 ár.

**25. februar**
Borghild Thomsen, ættað úr Sumba, 86 ár.
Kjartan Klein, Klaksvík, 83 ár.
Andrea Sivertsen, Gjógv, 101 ár.

**27. februar**
Patzy Rættá, vanliga nevndur Patzy hjá Jóhan í Sandi, ættaður av Tvøroyri, búsitandi í Havn, 82 ár.

## TILTØK

**Føstugudstænastur 3. sunnudag í føstu:**
*Vesturkirkjan:* kl. 11,
*Hestur:* kl. 13, Bergur D. Joensen
*Vágur:* kl. 11,
*Leiti:* kl. 12.30
*Vestmanna:* kl. 12, Inga Poulsen Dam
*Kvívík:* kl. 12, Hans J. Joensen, biskupur
*Kvívík:* kl. 17, Inga Poulsen Dam
*Christianskirkjan:* kl. 11, lestur
*Mikladalur:* kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
*Eiði:* kl. 11.40, skriftamál, kl. 12 messa,
*Norðskáli:* kl. 17 messa, Emil Olsen
*Skála:* kl. 11,
*Sjóvar kirkja:* kl. 12.10, Jógvan Fríðriksson
*Havnar kirkja:* kl. 11, Petur Martin Rasmussen
*Nólsoy:* kl. 12, altarg., Sverri Steinhólm
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Kirkja:* kl. 12,
*Hattarvík:* kl. 17, Elsa Funding
*Bøur:* kl. 12, David Johannesen
*Tvøroyri:* kl. 11,
*Fámjin:* kl. 12, altarg., Jónsvein Bech
*Hvalba:* kl. 12, Ólavur Rasmussen
*Sandvík:* kl. 14, Ólavur Rasmussen
*Sandur:* kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen
*Glyvrar:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Svínoy:* kl. 12, Heri Joensen

*Í Fámjin gongur talvan fyri Heimamissiónina*

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting (skipað barnaansing). Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Familjumøti.
Mánadagin kl. 19 Hugnaløta teirra ungu.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti í Læraraskúlanum.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti á Brekku 3. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Familjumøti og øll eru hjartaliga vælkomin, kl. 21 Útimøti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Møti har Vibekke Møller talar og tosar um incest. Kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn kl. 18 Møti har Palli Petersen skipar fyri.
Mánadag kl. 17 og 19 Skótamøti.
Týsdag kl. 20 Hornvenjing.
Mikudag kl. 15 Bønarmøti.

**Rhema á Hálsi**
Vikuskiftismøti: Evangel. møti verður fríggjakvøldið kl. 20 og leygarkvøldið kl. 19 og sunnudagin kl. 17. Tormund Hansen o.fl. luttaka við sangi, vitnisburði og talu. Øll eru vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti við Hans Kristian F. Johannesen.
Sunnukvøldið kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti.
Heimasíðan: www.koma.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorarbeiði fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Blákrossmøti v/ Helga og Jóannes.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Alheims bønardagur fyri kvinnur í Havn verður í ár hildin í Filadelfia, Landavegur 22, fríggjakvøldið 1. mars kl. 19.30, har allar kvinnur kunnu vera við.
Sunnnudagin kl. 11 Hámessa í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman, andakt og frásøgn um eina ferð í Avstralia, við Kjartan Mørkøre, presti.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Suunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Eliezer Braun, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Felagsmøti í Læraraskúlahøllini v/ Eliezer Braun.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Tjørnuvík**
Evangel. fundur verður í bygdarhúsinum leygarkvøldið kl. 19.30 og sunnudagin kl. 18. Leygarkvøldið syngur sangkórið í Ebenezer.
Barnamøti verður sunnudagin kl. 16, Svenning av Lofti, Poul Johan Djurhuus, Jógvan Páll Sevdal og Páll á Lakjuni luttaka.

**Nebo, Toftir**
Evangel. fundur verður á Svangaskarði sunnudagin kl. 18. Levi Joensen o.fl. tala og sangkreftir úr Betesda taka lut.

**Gøta**
Onki ungdómsmøti í kirkjukjallaranum í kvøld, vegna familjulegu í Nesvík.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 19 møti. Aftaná verður drekka. Innsavnan til húsið.
Mánakvøldið kl. 20 verður alment møti sum sjómanskvinnuringurin skipar fyri. Torleif Jóhannesen talar og vísir myndir frá arbeiðinum. Missiónsvikan byrjar týskvøldið 5. mars og heldur fram vikuna út.

**Keldan, Skálafirði**
Vikuskiftisfundir við Lenu og David Hansen. Byrjað verður leygarmorgunin kl. 10 og kl. 13.45 við seminar.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við David Hansen.
Sunnumorgunin kl. 11 Møti við Lene Hansen og Møti kl. 17 við David Hansen.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Missiónshúsið Tabor, Toftir**
Hugnakvøld fyri sjómonnum, útróðrarmonnum, egnarum o.ø. verður leygarkvøldið 2. mars kl. 20. Opið hús verður aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Karmel, Eiði**
Vármøtini byrja við føstugudstænastu mikudagin 6. mars kl. 20.30, Inga Poulsen Dam, prestur prædikar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 10 Bøn, kl. 20 Alpha-skeið.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúl, kl. 18 Møti v/ Hjalgrím Davidsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bíbliutími og Bøn.

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 verður møti við breyðbróting.
Liljurnar møta mánadagin kl. 17.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti um kvøldið vegna missiónsvikuna á Sandi.
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti v/ Terja. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Missiónsvikan byrjar týskvøldið 5. mars kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnud. kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti í Fjallbrúður, Elisabeth Joensen talar.
Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið. Øll eru vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Betania, Porkeri**
Mánakvøldið kl. 20 Kvinnumøti.

**Dagtilhaldið í Vági**
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00. Øll eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
**Kennir tú føroying í Keypmannahavn**, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við
*Reyða Kross Føroya,*
*Bryggjubakki 10,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 311391/261516.*

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Títt orð er sannleiki!*
*Jóhs. 17,17*

Kristna trúgvin byggir á ta sannføring, at Gud hevur opinberað seg fyri okkum menniskjum. Gud opinberar seg í Bíbliuni í og við Jesusi Kristi. Vit eru sum kristin sannførd um, at alt í Bíbliuni peikar okkum á Jesus. Hann er miðdepilin í Skriftini. Skriftin inniheldur Gud opinbering fyri heiminum. Jesus opinberar okkum Gud. Tað er eyðsæð, at Bíblian, sum inniheldur Guds opinbering á serligan hátt, hevur myndugleika fyriokkum kristnu. Gud opinberar seg í søguni. Hann talar og virkar í søguni. Bíblian opinberar okkum Gud í og við Jesu persóni, hann, sum er Gud og menniskja. Og vit eru eisinis annførd um, at Gud í anda og orði framvegis ger Kristus nærverandi fyri okkum. Tað er andin, sum í prædikuni framvegis opinberar okkum Kristus. Andin ger hann nærverandi og viðkomandi og gevur okkum lut í ferlsuverkinum. Gud opinberar seg soleiðis í dag eisini í sakramentunum. Har er hann ljóslivandi, skapandi og virkandi. Vit fáa frelsu Guds har. Trúgvin kemur aftrat og sigur ja til Jesus, sum opinberar seg fyri okkum. Tað er trúgvin, sum tekur ímóti Gudsgávuni, sum er Kristus, krossfestur og upprisin. Bíblian hevur myndugleika og tað hevur sunnudagsprædikan eisini, so framt hon vísir til Kristus. Alt vísir til Jesus á krossinum. Har gjørdist frelsan veruleiki, og orð og sakramentir bera okkum hana. Men vit eiga hana bert í trúnni! Eigur tú hesa trúgv?

Amen.

**David Johannesen**